ítróttur

Nr. 162 • leygardagur • 27. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## B36-FCM 2-2 (1-2):

# Úr kappingini við røttum ryggi

**B36 er úti av UEFA-cup kappingini, men teir fullu við æru. Við einum manni í undirtali góvu teir eitt ordans mannfólkaavrik, og at enda fingu teir eisini løn fyri stríðið, tá Allan Mørkøre javnaði til 2-2**

## FAKTA UM DYSTIN

**B36-FCM 2-2 (1-2)**
**UEFA-Cup dystur á Tórsvølli**
**1.500 áskoðarar**
1-0: Bergur Midjord, 4.
1-1: Razak Pimpong, 17.
1-2: Dennis Sørensen, 35.
2-2: Allan Mørkøre, 85.
**FCM víðari við samanlagt 4-3**
**Dómarabólkur úr Finnlandi**
**B36:** Jákup Mikkelsen - Bárður H. Joensen, Fróði Benjaminsen, Pól Thorsteinsson, Alex dos Santos - Niels Joensen (Heini í Skorini, 90.), Ingi Højsted (Okeke Obele Onyebuchi, 82.), Klæmint Matras, Mikkjal Thomassen, Bergur Midjord (Levi Hanssen, 90.) - Allan Mørkøre
**GK:** Bárður H. Joensen, 19., Mikkjal Thomassen, 44., Fróði Benjaminsen, 70.
**RK:** Bárður H. Joensen, 44 (2 gul kort)
**Á beinkinum uttan at koma inn:** Magnus E. Poulsen, Bogi Hermansen, Jóhan V. Gunnarsson, Thomas Hans L. Rubeksen
**Venjari:** Sigfríður Clementsen
**Hjálparvenjari:** Magni Mohr
**Liðleiðarar:** Sjúrður Norðbúð, Dánjal Petur Johansen og Kristian á Neystabø
**Lækni:** Bjarni á Steig
**FC Midtjylland:** Ola Tidman - Rasmus Daugaard Hansen, Kristian Bak Nielsen, Jesper Mikkelsen, Leon Jessen (Svenne Poulsen, 87.)- Dennis Sørensen, Michael Hansen, Mikkel Thygesen, Razak Pimpong (Ulrik Lindkvist, 56.)- David Nielsen (Klaus Kærgård, 46.), Frank Kristensen
**GK:** David Nielsen, 27.
**Á beinkinum uttan at koma inn:** Anders Rasmussen, Magnus Troest, Oluwafemi Ajliore, Marc Møller
**Venjari:** Erik Rasmussen
**Hjálparvenjarar:** Thomas Thomasberg og Jan Rindom
**Fysioterapeutur:** Nicklas Pedersen
**Lækni:** Jan Hede
**Liðleiðari:** Jørn Kjær

UEFA-CUP
*Jákup Mørk*

13 minuttir. Tað var løtan, sum B36 var í barónaseingini, tá teir á Tórsvølli tóku ímóti danska FC Midtjylland í øðrum undanumfarinum til UEFA-Cup kappingina.

Við frálíka avrikinum og tepra tapinum í Herning fyri tveimum vikum síðani, var útgangsstøðið hjá B36 nakað nógv betri, enn tað vanliga er hjá føroyskum liðum. Ein 1-0 sigur vildi verið nóg mikið hjá føroyska felagnum, og hóast teir ásannnaðu, at uppgávan var møtumikil, so vóru greiðu boðini, at farast skuldi eftir sigrinum.




### Dreymabyrjan

Stóra áskoðarafjøldin til dystin bar eisini boð um, at tað vóru fleiri enn spælararnir, sum trúu upp á møguleikan, og eftir bara fýra minuttum fingu mongu floksmenninir eisini alla orsøk at fagnast.

Talan var annars um fullkomuliga vandaleysa støðu, tá bólturin varð lagdur aftur til Ola Tidman í danska málinum. Bergur Midjord elti tó møguleikan, og so hendi tað, sum bara hendir teimum, sum trúgva upp á ómøguligu møguleikarnar. Svenski málverjin gleið, tá hann skuldi gera seg til at sparka, og so var Bergur sum eitt fok á honum. Hann vann tacklingina, og hóast hann var trýstur av verjuspælara, so fekk hann givið bóltinum seinasta skumpið, og so var B36 á odda.

Ein marru-byrjan fyri gestirnar, og eina løtu vóru teir eisini veruliga merktir av hesari. Á rennváta og knortluta vøllinum bar teimum ikki til at fáa ynsktu ferðina á spælið, og við kropsliga spælinum, sum B36 setti dagsskránna við, tóktust teir mest av øllum ynskja seg heim aftur til Herning.

B36 royndi at trýsta og stressa mótstøðuna, men so líðandi kom meira friður yvir spælið hjá gestunum. Teir vóru sterkari mann móti manni, og hóast trupla undirlagið, so megnaðu teir eisini betri at spæla seg niðan eftir vøllinum, og spakuliga gjørdist talan um trýst.

Sum tað so ofta hevur verið sæð, tá føroysk lið royna seg á altjóða pallinum, so vóru tað tó fyrst og fremst mistøk, sum kostaðu dýrt, tá mótstøðan skoraði. Fyrru ferðina misti B36 bóltin í uppspælinum, og yá verjuspælararnir ikki kundu semjast um at rudda burtur, streyk kviki Dennis Sørensen ígjøgnum, áðrenn hann flatt tvøturum, har ein púra blankur Razak Pimpong skoraði millum beinini á Jákupi Mikkelsen.

Seinna málið kom somuleiðis eftir býtt mistak. Vandin var ikki stórur, men millum tríggjar verjuspælarar fekk Dennis Sørensen brádliga fatur á bóltinum. Hann setti ferð á frá miðjum vølli, og tá hvørki Pól Thorsteinsson ella Klæmint Matras megnaðu at steðga honum, rundaði hann eisini Jákup Mikkelsen, áðrenn bólturin varð trillaður í tóma málið.

### Mótbrekkan

Í løtunum eftir útjavnandi málið hevði B36 tó í einum tveimum førum av álvara bitið frá sær. Ingi Højsted hevði í einum føri drønandi skot úr 18 metrum, sum málverjin akkurát fekk jústað uppum, og stutt eftir var Fróði Benjaminsen um reppið at stúta bóltin í kassan.

Stórt meira enn hesar møguleikarnir hevði B36 tó ikki. Málini tóktust hava givið gestunum neyðuga friðin í spælinum, og í roynd og veru tóktist 3-1 vera meira nærliggjandi enn 2-2.

Og brekkan skuldi eisini gerast enn tyngri hjá B36. Spælið hevði til tíðir lyndi at gerast hart, og serliga David Nielsen fýrdi ikki fyri at geva aftur av somu skuffu. Hann fekk eisini gult kort tíðliga í dystinum, og tey flestu vóru á einum máli um, at seinna gula kortið átti at komið, tá hann sparkaði eftir mótstøðumanni. Ivaleyst var talan eisini um frustratiónir, tá Bárður Joensen løtu seinni kom alt ov seint í tackling móti kvika Pimpong. Gaman í var ghanesarin kvikur at lata seg detta, uttan at verulig kontakt var millum spælararnar, men dómarin hevði fingið nóg mikið. Hann gav Bárði seinna gula kortið, og so máttu havnarmenninir gera seg til at spæla seinna hálvleik við 10 monnum. Ein avgerð, sum B36'arnir á ongan hátt vóru samdir við finska dómaranum um. Ikki minst, tí Ingi Højsted beint áðrenn hevði verið í líkari støðu, men tað ferðina tagdi floytan, tá Ingi valdi at hoppa og detta, heldur enn at bíða eftir jarðleggingini, sum heilt vist hevði fylgt við skreiðandi verjuspælaranum.

### Djarvir og sterkir

At uppgávan var mest sum ógjørlig, mundi nú standa øllum greitt. Men ivaleyst hevði onkur gloymt at sagt